Álit

í

løgtingsmáli nr. 95/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin) og løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum (Skattligar avleiðingar av negativari rentu o.a.)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð 9. mars 2021 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 22., 23. og 25. mars og 8. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Vinnuhúsið, Felagið Føroyskir Peningastovnar og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Magnus Rasmussen, Jákup Mikkelsen, Bill Justinussen, Kristin Michelsen og Ruth Vang) hevur hesar viðmerkingar:

Orsøkin til lógaruppskotið er fyrst og fremst eitt ynski um at tryggja vinnulívinum frádrátt fyri negativa rentu á innlánskontum.

Við uppskotinum verður staðfest, at negativar rentur, tað vil siga rentur, sum t.d. skulu rindast fyri at hava pening innistandandi í einum peningastovni, hava frádráttarrætt á sama hátt sum rentur, sum skulu rindast av skuld.

Gongdin seinastu árini við atliti at rentu hevur verið, at rentur fyri m.a. ávís realkreditlánsbrøv og innlánskontur eru ella skjótt kunnu gerast negativar. Tað er higartil ikki tikin støða til skattsetingina av negativari rentu, og galdandi skattalóggáva hevur ikki meira nágreiniliga tikið hædd fyri íkomnu støðuni. Men við hesum uppskotinum verður staðfest, at negativar rentur skattliga skulu javnsetast við positivar rentur. Rentuútreiðslur hava frádráttarrætt, meðan rentuinntøkur eru skattskyldugar.

Endamálið við uppskotinum er at fáa til vegar eina heimild, sum loyvir, at vinnulívið fær frádrátt fyri negativa rentu. Í øðrum lagi er endamálið við uppskotinum at tryggja, at negativ renta á útlánskontum sum heild verður viðgjørd eins og rentuinntøka. Hetta verður gjørt við at dagføra kapitalvinningsskattalógina og rentustuðulslógina við atliti at negativari rentu, bæði tá talan er um útlán og innlán.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Aksel V. Johannesen og Páll á Reynatúgvu) hevur hesar viðmerkingar:

Tikið verður ikki undir við uppskotinum. Peningastovnarnir hava stór yvirskot og onkur av teimum rindar eisini serstakt, stórt vinningsbýti út til eigararnar. Tískil er tað ikki neyðugt hjá peningastovnunum at taka negativa rentu.

Negativ renta hevur ta keðiligu avleiðing, at tað loysir seg ikki hjá fyritøkum og einstaklingum at hava pening standandi í bankanum. Hetta hevur við sær, at fleiri og fleiri, ið eiga pengar, investera hesar í fasta ogn, við teirri avleiðing at húsaprísirnir eru vaksnir nógv seinastu tíðina. Tá tey sum eiga pengar keypa upp hús, ikki til at búgva í, men sum eina íløgu, hevur hetta við sær, at tað er trupult hjá vanligum føroyingum at fáa fatur á einum húsum til ein kostnað, sum tey hava ráð til at gjalda.

Tí eigur politiska skipanin at senda eitt greitt signal til peningastovnarnar um, at vit ikki vilja hava negativa rentu.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 14. apríl 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	